rættiligt fiskaloysi, og tá gjørdist neyðugt hjá teimum mangan at gera langar túrar eftir brosmu og longu. Hetta var tó mest í summarhálvuni, tá veðrið var betri, og teir høvdu fríløtur.

- Vit vóru soleiðis fleiri túrar úti í kantinum, á Føroyabanka og vestur úr Mykinesi, so her var nógv sigling.

Men hvussu riggaði tað so hjá teimum at leggja veiðina um – frá hýsu og toski til at veiða brosmu og longu?

- Jú, tað riggaði bara væl. Tá tú ikki visti, kundi tú spyrja royndari menn um ráð og síðan var bara at royna sjálvir, leggur hann aftrat.

Tá faðir og synir seldu 20-tonsaran aftur í seinnu helvt av nítiárunum, fingu Jacob og Súni sær eitt 10-mannafar við dekki, sum var bygt í Kaldbak. Maggi og synir hansara høvdu frammanundan keypt sær eitt 8-mannafar, og tá teir so høvdu selt 20-tonsaran, fóru teir at seta sær 8-mannafarið í stand.

Longu áðrenn teir keyptu 8-mannafarið, høvdu synirnir havt eitt 5-mannafar at spæla sær við. Í 1997 seldu teir 8-mannafarið og keyptu sær eina nýggja Heidi. Hetta var ein Viksund-bátur, sum var um 27-28 føtur langur, og hendan bátin høvdu teir eisini í nøkur ár, til teir keyptu sær ein Starlet, sum nú er 34 føtur langur.

- Starletturin er ein góður og rúmligur bátur, sum roynist sera væl. Maskinan er rættiliga nýggj.

## Vánaligur útróður

Síðan Maggi gavst at arbeiða við kjøti fyri seks árum síðan, hevur hann burturav róð út, umframt at hann hevur tikið vaktir sum løgreglumaður.

- Útróðurin er sera vánaligur í løtuni, og sum er, er hetta ikki nakað, tú kanst liva av. Veiðan er lítil, og fiskaprísirnir hava verið uppaftur verri, um man so kann siga. Bert fyri at taka eitt dømi: Fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár havi eg avreitt 2-3 tons meira enn somu mánaðir í fjør, men søluvirðið í ár er einar 100.000 krónur minni enn í fjør.

Maggi sigur, at soleiðis, sum veiðan er í løtuni, er vónleyst at fáa lønandi vinnu við útróðri.

- Eg vil siga, at fiskiskapurin hevur verið slakur alt hetta seinasta árið og í fjør heyst, tá dagarnir kortini royndust betri enn higartil í ár, fingu frægastu bátarnir um 100 pund á línuna. Hetta er ikki nógv, tá fleiri bátar royna við feskari gággu. Hetta gevur lítla úrtøku, tá havt verður í huga, at agn og egning skulu rindast av veiðini hjá nógvum útróðrarmonnum.

Sjálvur sigur útróðrarmaðurin, at hann hevur egnt alla línuna sjálvur í ár og hevur soleiðis ikki rindað fyri eina línu í egning.

- Eg fiski umleið ein triðing av agninum sjálvur. Tað er gágga, sum eg veiði við rúsum. Restin verður egnd við høgguslokki og sauri. Tann góði makrelurin er ikki keypandi so dýrur, sum hann er. Sum gongdin er í løtuni, hevur tú sum útróðrarmaður hvørki ráð til egnarnar ella fólk aftrat tær í bátinum.

Maggi hevur havt egningartrakt í bátinum, men í løtuni stendur hendan í landi.

- Eg havi blakað traktina í land – í hvussu er fyribils. Tað er meira rennarí aftur og fram í bátinum, tá tú ert einsamallur á báti og egnir við trakt. Tú noyðist at ruska í agninum í traktini í heilum, so húkarnir ikki fara ígjøgnum eitt "hol" av øgnum, sum leggja seg í traktina. Haraftrat kemur, at bátar, sum seta úr trakt, helst brúka umleið eitt kilo meira av agni uppá hvørja línu, sigur hann.

## Batnandi útlit

Maggi heldur, at hóast útróðurin í longri tíð hevur verið sera vánaligur, so eru kortini útlit til, at vend fer at koma í, áðrenn langt um líður. Nógva nebbasildin og eftir øllum at døma góðu náttúru-viðurskiftini í havinum geva útróðrarmonnum vónir um betri tíðir.

- Eg havi hoyrt um snellubátar, eitt nú vestur úr Sandoynni og suðuri á Dalagrynnuni, sum hava fingið væl av toski. Havi eisini heft meg við, at í støðum hevur nógv yngul, sum er frá undanfarna ári, hingið á húkunum. Hetta havi eg eitt nú sæð á eini leið einar 8-9 fjórðingar úr Borðuni. Tú fært eina rúgvu av hesum á húkarnar, og síðan er alt burtur aftur. Eg eri tí ikki samdur við fiskifrøðingarnar um, at tann smái fiskurin kemur oman úr fjøllunum, sum Maggi skemtiliga tekur til.

Tað, sum útróðrarmenninir nú bíða spentir eftir, er, um nakar hvítingur fer at verða at fáa.

- Enn hevur so einki verið at fingið, tó at tíðin til veiði eftir hvítingi nú skuldi verið komin.

Tá vit vitjaðu Magga og sonin Rúna í egningarskúrinum týskvøldið í hesi vikuni, tóku teir 24 egndar línur út úr frystarínum.

- Nei, vit fara ikki at royna eftir hvítingi á hesum sinni, men fara at vita, um nøkur hýsa og kanska onkur gráur fisk fæst, søgdu teir.

## Slaktarasjúka

Magnus í Hjøllum lærdi til útbeinara, meðan hann var í starvi hjá Eysturoyar Heilsølu, har hann tók prógv í 1989.

- Eg náddi akkurát ikki 30 ár hjá Eysturoyar Heilsølu, og endaði mína karrieru innan hetta øki hjá MBM-Kjøti í Hósvík, har eg var í sløk trý ár.

Tað er strævið fyri handliðin at útbeina kjøt, og hetta merkti Maggi eisini, sum árini gongu.

- Vit plaga at tosa um slaktarasjúku, har tú hevur pínu í tí handliðinum á hondini, har tú heldur knívinum. Handliðurin gerst stívur, og megin í honum minkar. Tá tú so gevst at skera og ikki gert hesar rørslur meira, verður handliðurin aftur, sum hann eigur at vera. Fert tú aftur at skera, pínir tú líka sum "sárið" av nýggjum, og tú merkir skjótt, at pínan kemur aftur. Eg haldi, at tað er okkurt sum hendir við bróskinum í handliðinum, sigur hann.



*Eftir at hava havt útróður sum frítíðarvinnu í mong ár, hevur Magnus í Hjøllum seinastu seks árini verið útróðrarmaður burturav. Týskvøldið, tá vit vitjaðu hann og sonin Rúna í egningarskúrinum, tóku teir 24 stampar út, sum teir fóru at seta eftir hýsu og toski*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Tað var longu í 1966, at pápi og vit brøðurnir keyptu seksæringin Vaðið og fóru at rógva út í fríløtum, bæði eftir arbeiðstíð, í vikuskiftunum og í ferium, sigur Magnus í Hjøllum, sum annaðhvørt vikuskifti starvast sum løgreglumaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

...

Maggi hevur starvast hjá løgregluni sum eykapolitistur heilt síðan 1984, og hesa uppgávu røkir hann framvegis.

Fara vit nú nógv ár aftur í tíðina, tá toftadrongurin er um 14 ára aldur, var Magnus trý summur á sild við gomlu sildaskipunum.

- Eg var mín fyrsta túr við Høganesi sum 14 ára gamal, síðan var eg eisini við Oyrasker og Vesturvík. Hetta var sumrini 1965, 1966 og 1967. Eg plagdi at klára tveir túrar hvørt summar.

Eftir at Maggi hevði tikið realskúlaprógv, sigldi hann eini tvey ár við gamla Róki, sum sigldi við sandi og øðrum millum oyggjarnar.

Eftir tíðina umborð á sildaskipunum og seinni við Róki, fór hann ongantíð aftur á fiskiveiði við skipi, men fór í starv hjá Eysturoyar Heilsølu, har hann sum nevnt var í tænastu øll síni bestu ár.

- Hóast eg havi verið nógv á báti gjøgnum alt mítt lív, dámar mær væl at fáast við útróður burtur av, nú hetta umsíðir er vorðið mítt starv. Vit, sum rógva út, vóna bara, at viðurskiftini fara at broytast, so útróðurin aftur gerst lønandi og kann verða eitt livibreyð hjá teimum, sum eru í hesi vinnu, sigur Magnus í Hjøllum.